

*Hanus Kamban hevur týtt Shakespeare-sjónleikin, Othello, sum fyrstu ferð verður sýndur í Sjónleikarhúsinum leygardagin*

# Shakespeare í Sjónleikarhúsið

**Nýggi sjónleikarabólkurin, Huðrar, hevur komandi leygardag frumsýning av leikinum Othello hjá Shakespeare, sum Hanus Kamban hevur týtt. Tað eru 11 framførslur á skránni, og tær verða allar í Sjónleikarhúsinum í Havn**

LEIKLIST
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Ein nýggjur sjónleikarbólkur, ið varð stovnaður í januar í ár, og sum kallar seg Hurðar, kemur komandi vikuskifti við einum leiki eftir Shakespeare. Kendi leikurin, sum Hanus Kamban hevur týtt, er Othello. Listarliga vegleiðing og leikstjórn stendur Hans Tórgarð fyri, meðan Jóna Thomsen hevur gjørt koreografi og luttekur eisini sjálv við dansi í sjónleikinum.

Leikararnir, ið sjálvir hava tikið stig til sjónleikin og nýggja bólkin, eru sjey í tali. Tey eru Sóley Danielsen, Durita Dahl Andreassen, Tjóðhild Patursson, Búi Rouch, Jákup Wardum, Dávur Djurhuus og Edvard Skúvadal. Leikurin er vandur í einar tríggjar mánaðir.

Othello er ein gamal leikur, men kjarnan í søguni er tíðarleys. Sum eitt nýmótans ískoyti er livandi tónleikur, dansur og ljós ein týðandi partur av framførsluni. Tónleikararnir eru Búgvi J. Magnusen, John Ivar Venned, Ísak Petersen og Mattias D. Kapnas.

Sýningarnar byrja klokkan 20 hvørt kvøld frá 3. maj og atgongumerki á 125 krónur fáast til keyps í Kunningarstovuni og ein tíma undan hvørjari sýning í Sjónleikarhúsinum.

# Horntónleikur í Miðlahúsinum

Í kvøld kl 19.00 fer Havnar Ungdóms Hornorkestur og orkestrið Spírar at hava konsert í Miðlahúsinum

H.U.H hevur verið virki í fleiri ár. Síðstu tvey árini eru fleiri av teimum eldru spælarunum fluttir av landinum í lestraróðrindum og hevur orkestrið síðani fingið fleiri nýggjar spælarar.

Bæði Spírar og H.U.H eru tónleikabólkar á Tórshavnar Musikkskúla. Venjarar hjá H.U.H eru Ken Jones og Ólavur Olsen og í Spírum Ken Jones og Bjarni Berg

Konsertin verður sum áður nevnt í kvøld kl 19.00 í Miðlahúsinum og er hon ókeypis.


## Yvirlýsing

javni

**Á aðalfundinum hjá Javna í Havn leygardagin 26/4-2008 varð niðanfyri standandi yvirlýsing samtykt:**

Javni hevur staðfest, at ein samd rættarnevnd hevur mælt frá at taka undir við uppskotinum at seta donsku verjulógina (værgemålsloven) í gildi í Føroyum, tí tað krevur dagføring av so nógvum øðrum lógum. Rættarnevndin ásannar samstundis, at tað er tørvur á at dagføra lóggávuna á økinum.

Javni heitir tí við hesum staðiliga á Føroya Løgting at leggja uppskotið at seta donsku verjulógina í gildi í Føroyum fram av nýggjum eftir ólavsøku – og at brúka tíðina til tá til at dagføra tær lógir, ið krevjast.

Samstundis heitir Javni staðiliga á Føroya Løgting at seta ST-sáttmálan um javnrættindi fyri brekað í gildi í Føroyum, samstundis sum hann verður settur í gildi í Danmark.

*Soleiðis samtykt á aðalfundi Javna í Havn 26/4-2008*





## *Lektari og adjunktur í løgfrøði*

***2 størv á Fróðskaparsetrinum***

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt nýtt lektarastarv í løgfrøði og eitt nýtt starv sum adjunktur í løgfrøði leys at søkja.

**Starvsøki**
Umframt at taka sær av undirvísing í grundskeið í lóg skulu bæði lektarin og adjunkturin fyrireika og leggja til rættis eina komandi masterútbúgving í lóg og fremja gransking í lóg. Granskingarparturin hjá lektaranum verður ta fyrstu tíðina tengdur at serøki hansara, men væntað verður, at granskingarøkið verður breiðkað, sum frá líður, og at lektarin rættiliga skjótt skapar møguleika fyri at knýta Ph.D.studentar í løgfrøði at deildini.

Adjunktstarvið er eitt útbúgvingarstarv sett fyri 4 ár, soleiðis at adjunkturin eftir í mesta lagi 4 árum vinnur sær neyðugan granskingar- og undirvísingarførleika og tá kann lektarametast og, um útslitið verður positivt, setast í fast starv sum lektari.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin til lektarastarvið skal umframt kandidatútbúgving í løgfrøði hava granskaraútbúgving í løgfrøði á Ph.D.stigi og hava royndir sum granskari. Lektarin skal hava undirvísingarroyndir og skal duga at samskifta væl á føroyskum, enskum og norðurlendskum. Lektarin skal hava førleika til at knýta netverk og samstarva við onnur universitet.

Adjunkturin skal hava kandidatútbúgving ella samsvarandi í løgfrøði, hava ávísar granskingarroyndir, og um viðkomandi ikki hevur longu hevur ella er komin ávegis við Ph.D.lestri, skal hann ella hon lata seg innskriva til Ph.D.lestur í løgfrøði. Harumframt skal adjunkturin hava somu almennu førleikar sum lektarin.

Til at meta millum umsøkjararnar verður sett ein sakkøn metingarnevnd mannað vit trimum fólkum. Av hesum skal eitt fólk hava góðan kunnleika til løgfrøði í Føroyum.

**Umsóknir**
við ævilýsing, próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, vísindaligum greinum, ritgerðum og bókum í trimum eintøkum skula verða Fróðskaparsetrinum í hendi áðrenn 9. mai 2008. Viðmerkt skal verða, hvat av størvunum søkt verður.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, tel 352583, *elinsj@setur.fo* ella til rektaran Jóan Paula Joensen, tel 352585 ella 552503 *jopajo@setur.fo*

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn

Søgu- og samfelagsdeildin heldur til í nýístandsettum húsum í Jónas Broncksgøtu 25 saman við Sjúkrarøktafrøðiskúla Føroya.

Undirvísingarhøli, bókasavn, verkstova og kantina eru felags.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SENDISTOVAN